Hert doping-eftirlit

Pat McQuaid, sum er forseti fyri altjóða súkklusambandið, UCI, sigur, at tey í ár vilja hava enn strangari doping-eftirlit til Tour de France. – Væntandi taka vit einar 300-400 dopingroyndir, og vit hava longu nú einar 50 súkklarar, sum vit fylgja serliga væl. Tað er serliga innan EPO-líknandi evni, at McQuaid vil herða eftirlit og revsing. Hinvegin hevur hann sum so ikki tað stóra ímóti, at Tom Boonen tekur lut. Boonen hevur havt trupulleikar við kokainmisnýtslu.

Skelkur í Barcelona

Fíggjarstjórin í Barcelona, Xavier Sala, sigur seg als ikki skilja, hvussu Real Madrid hevur ráð til at keypa spælarar fyri higar til 1,2 milliardir. Florentino Perez, forseti í Real Madrid, sigur, at hann íalt roknar við at brúka 2,25 milliardir, men hesum trýr Sala snøgt sagt ikki. – Hann sigur, at hann vil selja spælaratroygjur, fyri at vinna peningin aftur. Men so skal hann selja 30 milliónir troyggjur, og tað ber ikki til. So eg haldi, at tað hevði verið áhugavert, um Perez kundi upplýst, hvaðani peningurin kemur, sigur Sala.

Danska kvinnulandsliðið, sum endar sítt flogbóltsár við teimum báðum dystunum ímóti føroyska kvinnulandsliðnum, ið enn hevur sína størstu uppgávu í ár fyri framman: Oyggjaleikirnar á Álandi

Danska landsliðið leitar

Danska kvinnulandsliðið í flogbólti, sum um vikuskiftið spælir tveir landsdystir ímóti Føroyum, hevur síðstu dystirnar spælt væl, bæði í álopi og verju, men leitar eftir støðufesti, tí liðið megnar ikki at halda seg á jøvnum stigi ein heilan dyst

FLOGBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Eingin ivi er um, at okkara flogbóltskvinnur kunnu vænta sær góða mótstøðu um vikuskiftið, tá danska kvinnulandsliðið vitjar. Avtala er fingin í lag um tveir dystir, sum verða í morgin klokkan 15 í Trongisvági og sunnudagin klokkan 14.15 á Giljanesi.

Hóast Danmark ikki telist millum tey allarbestu ella sterkastu liðini, sum eru, er liðið altíð eitt vet hægri í styrki enn tað føroyska, so tí kann roknast við góðari mótstøðu, ið Føroyar vónandi kunnu brúka til nakað í fyrireikingunum til Oyggjaleikirnar á Álandi, sum byrja um tvær vikur.

Hetta kappingarárið hava donsku flogbóltskvinnurnar verið til tvær kappingar í januar og á einari venjingarferð í mai. Fyrst vóru tær við í Novotel Cup í Luxembourg, har tær taptu fyri Eysturríki og Azerbaijan, men vunnu 3-2 á vertunum. Síðani taptu tær allar tríggjar dystirnar í HM-undankapping í Estlandi, sum vóru ímóti Estlandi, Georgia og Moldova, og í mai mánaði taptu donsku kvinnurnar eisini tríggjar venjingardystir ímóti Bretlandi, sum vóru spældir í Sheffield.

Munur á og ikki

Danska og svenska kvinnulandsliðið høvdu fyrst í hesum mánaðinum eina felags venjingarlegu í Brøndby í Danmark. Liðini vandu saman og spældu tveir venjingardystir og ein altjóða skrásettan landsdyst.

Venjingardystirnir vórðu spældir í Idrættens Hus í Brøndby, har Danmark vann 3-1 í tí fyrra og tapti 0-3 í tí seinna. Í fyrra dystinum vóru settúrslitini 8-25, 25-18, 25-18, 25-20 og í tí seinna 17-25, 21-25, 9-25.

Tá so »veruligi« landsdysturin var spældur í Kildeskovhøllini í Gentofte, endaði Svøríki omaná við einum 3-1 sigri. Danmark vann fyrsta sett 25-21, men tapti trý tey næstu 20-25, 20-25 og 19-25.

Her skal so eisini nevnast, at svenski kvinnuflogbólturin verður hildin at liggja eitt vet hægri enn tann danski, hóast munurin ikki er so stórur.

Leitandi lið

Niðurstøðan hjá donsku venjarunum, Tony Westman og Jens Bang, var eftir teir tríggjar dystirnar, at liðið hevði spælt væl, bæði í álopi og verju, men leitar eftir støðufesti, tí liðið megnar ikki at halda seg á jøvnum stigi ein heilan dyst.

Á liðnum eru fleiri spælarar, sum vístu seg at roynast væl, og lítið man heldur vera at ivast í, at føroysku venjararnir, Kristian Mikkelsen og Jóhan Petur á Stongum, munnu vita, hvørjum teir serliga skulu hava eitt vakið eyga við.

Mie Lindgren, sum ímóti Føroyum aftur verður á kantinum, har hon plagar at spæla, avloysti ímóti Svøríki sum libero, har hon royndist væl. Og somuleiðis staðfesti Karen Helmer-Hansen, at hon er besti danski álopsspælarin og tí eisini tann, liðið fyri stóran part byggir sítt spæl rundanum. Eisini verður nevnd Lykke Degner, sum í eina tíð hevur verið burtur frá landsliðnum, men serliga vísti seg at vera ein styrkur í blokkinum.

FØROYAR

Nr.	Navn	Pláss	Felag	Hædd	Aldur	Dystir
1	Annika á Stongum	Hevari	SÍ	165	20	19
2	Birgit Guttesen	Diagonal	SÍ	176	19	9
3	Helga Guttesen	Diagonal	SÍ	181	20	4
4	Hjørdis Johannesen	Miðja	Fleyr	180	34	47
5	Angeli Joensen	Hevari	KÍF	170	24	0
6	Helen á Lakjuni	Kantur	ÍF	179	31	46
7	Katrin Petersen	Miðja	TB	175	19	0
8	Guðrið Syderbø	Libero	Fleyr	173	24	10
9	Anja Danielsen	Kantur	Fleyr	182	16	0
10	Birita Joensen	Miðja	KÍF	178	23	13
11	Karin Mikkelsen	Kantur	SÍ	166	23	28
12	Sólva Dimon	Kantur	Svedala Volley	176	20	13
			Miðal	**175,1**	**22,8**	**15,8**
	Kristian Mikkelsen	Venjari				
	Jóhan Petur á Stongum	Hjálparvenjari				
	Sára Danielsen	Fysiotearpeutur				

DANMARK

Nr.	Navn	Pláss	Felag	Hædd	Aldur	Dystir
1	Eva Mielskov Bang	Hevari	Brøndby Volley	180	18	7
2	Nicoline Fürstenberg	Hevari	Holte IF	172	18	6
3	Helle Glasdam Sørensen	Libero	DHG Odense	168	20	6
4	Mie Lindgren	Kantur	Brøndby Volley	175	20	28
5	Stine Bleeg Christiansen	Hevari	Thompsen University	171	24	41
6	Louise Alrø	Kantur	Örebro Volley	188	20	48
8	Christina Jensen	Miðja	Brøndby Volley	182	21	39
10	Melcijana Salispahic	Kantur	Fortuna Odense	176	21	39
14	Natja Bech Kjeldsen	Kantur	Skovbakken Volley	182	18	17
15	Karen Helmer-Hansen	Kantur	Fortuna Odense	184	22	18
17	Lykke Degner	Miðja	Thompsen University	190	21	19
			Miðal	**178,9**	**20,3**	**24,4**
	Tony Westman	Venjari				
	Jens Bang	Hjálparvenjari				
	Sven-Erik Lauridsen	Fysioterapeutur				

Rás 2 sendir

Tá bestu flogbóltskvinnurnar hjá Føroyum og Danmark spæla seinna landsdystin teirra millum, sum verður á Giljanesi sunnudagin klokkan 14.15, fer Rás 2 at hava beinleiðis frásøgn, sum byrjar klokkan 14.

Í annaðkvøld klokkan 18 eru somuleiðis beinleiðis ítróttarfrásagnir á Rás 2, tí tá fara Tróndur Arge og Hilmar Jan at siga frá tveimum dystum í Vodafonedeildini, sum eru dysturin á Argjum millum AB og B68 og dysturin í Gøtu millum Víking og KÍ.

Haraftrat verður vanliga fótbóltssendingin, »Triði hálvleikur«, á Rás 2 sunnudagin klokkan 17.